# Útflýggjan av sínámillum upplýsingum í málum um kynsligan ágang og annan harðskap móti børnum og ungum

*-ein leiðbeining*

***Barnahúsið 2016***

# Innihald

Inngangur ... 4
Sínámillum upplýsingar millum barnaverndartænastur, løgreglu og ákærumyndugleikan ... 5
Heildarlýsing ... 5
Endamál ... 5
Lyklahugtøk og treytir ... 5
Tey, ið upplýsingar kunnu latast um millum myndugleikar ... 5
Upplýsingar, ið kunnu verða latnir sínámillum ... 5
Tað skal vera neyðugt við sínámillum upplýsingum ... 6
Nær kunnu upplýsingar verða latnir sínámillum? ... 7
Myndugleikar, ið kunnu lata upplýsingar sínámillum ... 8
Samtykki ... 8
Niðurskriving av upplýsingum hjá løgregluni ... 9
Tøk fakfólk við neyðugum førleikum, tá avgerðir skulu takast ... 10
Samstarvið millum barnaverndartænastur og løgreglu ... 11
Uppgávan hjá barnaverndartænastuni ... 11
Uppgávan hjá løgregluni ... 11
Avbjóðingar og loysnir ... 11
Barnahúsið ... 15
Heildarlýsing ... 15
Tá Barnahúsið verður nýtt ... 15
Sínámillum upplýsingar í Barnahúsinum ... 17
Heildarlýsing ... 17
Endamálið við § 10a ... 17
Treytir ... 17
Fakfólk, ið kunnu lata upplýsingar sínámillum ... 17
Upplýsingar, ið kunnu latast sínámillum ... 18
Tað skal vera neyðugt við sínámillum upplýsingum ... 19
Nær ber til at lata upplýsingar sínámillum? ... 19
Samtykki ... 21
Virkis- og avgerðarmyndugleiki ... 21
Aðrar viðkomandi reglur um at lata upplýsingar sínámillum og samstarva ... 23
Sum heild ... 23
Barnaverndarlógin ... 23

Herd fráboðanarskylda ........ 23
Fyrisitingarlógin ........ 23
Tagnarskylda ........ 23
Persónsupplýsingarlógin ........ 24
Sum heild ........ 24
Forrættindi ........ 24
Viðkvæmir upplýsingar ........ 24
Rættargangslógin ........ 24
SSP-samstarvið ........ 24

# Inngangur

Við løgtingslóg nr. 139 frá 18. desember 2013 um broyting í løgtingslóg um barnavernd kom lógarbroyting, sum gevur avvarðandi myndugleikum heimild at lata upplýsingar sínámillum í málum, ið snúgva seg um kynsligan ágang og annan harðskap móti børnum.

Lógarbroytingin gevur hesum myndugleikum møguleika at lata upplýsingar sínámillum uttan at hava fingið samtykki frá foreldrunum, til tess at byrgja fyri ágangi móti børnum.

Heimildin er at finna í § 10a, stk. 2, har ásett verður, at samstarvspartarnir kunnu lata upplýsingar:

*um heilt privat viðurskifti hjá barninum og familjuni sínámillum, tá umhugsni fyri viðurskiftum barnsins fer fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva grund fyri dyljan*.

Henda leiðbeining er gjørd eftir nýggju lógarásetingini. Hon er fyrst og er fremst ætlað starvsfólki í barnaverndartænastunum, sum í sínum arbeiði hava mál um kynsligan ágang og annan harðskap móti børnum um hendi, og har tað tískil er umráðandi at halda málunum á beinari kós frá byrjan til enda.

# Sínámillum upplýsingar millum barnaverndartænastur, løgreglu og ákærumyndugleikan

## Heildarlýsing

Stk. 2 í § 10a í Løgtingslóg um barnavernd, gevur samstarvspørtunum heimild at lata upplýsingar sínámillum, tá orsøk er at vera stúrin um eitt ávíst barn ella ungfólk, tá talan er um børn og ungfólk undir 18 ár hava verið fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi ella tá illgruni er um, at hesi eru ella hava verið fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi.

Samstarvspartarnir kunnu lata upplýsingar sínámillum, tá tað verður mett neyðugt at byrgja fyri ágangi móti børnum og ungum.

## Endamál

Nýggja lógarásetingin hevur til endamáls at tryggja, at fyribyrging fer fram so tíðliga sum til ber, umframt at myndugleikarnir skulu kunna samskipa sítt arbeiði, har vitan ella illgruni er um ágang móti børnum og ungum.

Við ásetingini ber til hjá avvarðandi myndugleikum at lata upplýsingar sínámillum, tá mál taka seg upp, sum teir ofta ikki hava fult innlit í, og har stúrt verður fyri børnum ella ungum, tí illgruni er um kynsligan ágang ella annan harðskap.

Endamálið er eisini – við at gera eina skjóta meting av støðuni – at veita hjálp skjótast gjørligt.

Afturat hesum gevur ásetingin møguleika at fáa greiðu á, um grundarlag er fyri revsirættarligum stigum í málinum ella ikki.

## Lyklahugtøk og treytir

### Tey, ið upplýsingar kunnu latast um millum myndugleikar

Myndugleikarnir kunnu lata upplýsingar sínámillum um børn og ung undir 18 ár, tá stúran er um kynsligan ágang ella annan harðskap. Um tað hevur týdning fyri málið, ber eisini til at lata upplýsingar sínámillum um foreldur og onnur, ið hava við barnið ella tann unga at gera.

### Upplýsingar, ið kunnu verða latnir sínámillum

Starvsfólk innan løgreglu og ákærumyndugleika, umframt málsviðgerar í barnaverndartænastunum, kunnu lata allar viðkomandi upplýsingar sínámillum um heilt privat viðurskifti hjá einum barni ella ungum, ið hava við persónligu umstøðurnar at gera, eins og heima við hús.

Heilt privat viðurskifti fevna eitt nú um upplýsingar um heilsustøðuna og tyngjandi sosialar trupulleikar, eins og upplýsingar um menningarstøðuna hjá barninum ella tí unga, ella viðurskifti viðvíkjandi atburði, familju, heilsu, skúla, frítíð og vinum.

Málsviðgerin í barnaverndartænastuni kann eitt nú skifta orð við løgregluna ella ákærumyndugleikan um sína fatan av likamligu ella sálarligu støðuni hjá einum persóni fyrr, nú ella frameftir. Sama er galdandi viðvíkjandi nýtslu av heilivági ella misnýtslu av rúsandi evnum, eins og upplýsingar um kynslív og møgulig revsiverd viðurskifti í tann mun tað er viðkomandi fyri málið.

Eisini kunnu upplýsingar verða latnir sínámillum um børn og ung, ið vantrívast og til dømis hava ein avbjóðandi kynsligan atburð, hava ilt við at hugsavna seg, hava ilt í búkinum, halda seg fyri seg sjálvi, og tá ótti er fyri, at orsøkin til vantrivnaðin er at finna í kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi.

Týðandi upplýsingar um umstøðurnar heima við hús kunnu vera upplýsingar um støðuna hjá foreldrunum, her ímillum teirra samlív, og um systkin.

Talan kann eitt nú vera upplýsingar um, at ein mamma býr saman við manni, sum løgreglan kennir frammanundan, tí hann er dømdur fyri kynsligan ágang móti børnum og ungum, ella sum er illtonktur um somu viðurskifti.

Upplýsingar um arbeiðsviðurskifti og arbeiðspláss hjá einum fólki, sum er undir grundaðum illgruna um kynsligan ágang ella annan harðskap, kunnu eisini latast sínámillum í tann mun viðkomandi er partur av málinum í Barnahúsinum.

Harafturat ber til at lata upplýsingar millum løgreglu og barnaverndartænastu um, hvørjar kanningar og víðari stig, ið ætlanir eru um í einum máli. Talan kann eitt nú vera um upplýsingar um, um og nær ein læknakanning ella avhoyring við videoútgerð skal fara fram, ella hvørt ætlanir eru heimavitjan ella samrøðu við barnið.

Avmarkanin av, hvørjir upplýsingar hoyra til heilt privat viðurskifti, samsvarar við tær í fyrisitingar-lógini og í persónsupplýsingarlógini.

Tá mett verður um, hvørt upplýsingar hoyra til heilt privat viðurskifti, eigur dentur at verða lagdur á, um upplýsingarnir í sjálvum sær avdúka serliga viðkvæmar síður av heimalívinum hjá tí einstaka.

Um upplýsingar ikki kunnu latast sínámillum sambært § 10a, er framvegis møguleiki fyri hesum í samsvari við heimildirnar í fyrisitingarlógini og persónsupplýsingarlógini. Sí nærri um hetta seinni.

## Tað skal vera neyðugt við sínámillum upplýsingum

Tá myndugleikar lata upplýsingar sínámillum, skulu teir vera *neyðugir* fyri at verja børn og ung móti kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi. Hetta kann gera sítt til, at byrgt verður fyri framhaldandi ágangi, umframt at stuðlandi tiltøk verða sett í verk fyri børn og ung, sum eru rakt.

Í hvørjum einstøkum føri verður ítøkiliga mett um tørvin á sínámillum upplýsingum. Somuleiðis verður ein ítøkilig meting gjørd av, hvørjar upplýsingar, ið myndugleikar skulu lata sínámillum.

Upplýst eigur ikki at verða um øll viðurskifti hjá børnum og ungum sambært § 10a, men bert um tað, sum er neyðugt til tess at fyribyrgja kynsligan ágang ella annan harðskap. Tað er tó umráðandi, at myndugleikarnir ikki halda ov nógvum aftur, ella eru ov varnir við at lata upplýsingar sínámillum. Talan kann eisini vera um samband millum barnaverndartænastu og løgreglu á byrjanarstigi, tá ávísar ábendingar eru um ágang. Barnaverndartænastan kann sambært sínum upplýsingum og eini

fakligari meting taka málið upp, og tað er ikki nøkur fortreyt, at aðrir fakbólkar eisini hava verið stúrnir um ávísa barnið ella ungfólkið.

***Dømi 1:***

***Ein kvinna vendir sær til barnaverndartænastuna. Hon greiðir frá, at grannin, ið er mamma eina tólv ára gamla gentu, fyri hálvum ári síðani flutti saman við einum manni. Sambært grannanum hevur hesin maður myndir hangandi av naknum ungum gentum, og grannin er stúrin um, hvat samband maðurin man hava við ta tólv ára gomlu gentuna.***

***Barnaverndartænastan hevur tveir mánaðir frammanundan fingið fráboðan frá skúlanum um gentuna, har sagt verður frá, at hon hevur broytt atburð seinastu tíðina. Gentan er vorðin bæði tung og fjar í huga, tykist hava ótta á sær og er meira og meira burtur frá skúla. Í sambandi við hesa fráboðan var ætlanin at hava eina samrøðu ávísan dag við gentuna í skúlanum, men hetta var av ongum. Gentan var ikki í skúla tann dagin, og mamman segði í eini telefonsamrøðu, at gentan hevði tað gott.***

***Í eini slíkari støðu, har barnaverndartænastan hevur upplýsingar, ið samanumtikið elva til illgruna um kynsligan ágang, er tað umráðandi at skifta orð við løgregluna.***

Tað er ikki av avgerandi týdningi fyri sínámillum upplýsingarnar, *hvar* ágangurin hevur verið, ella *hvør* hevur framt hann. Talan kann tískil vera um ágang heima við hús, aðra staðni, har barnið ella tann ungi plagar at halda til, ella í fremmandum umhvørvi.

## Nær kunnu upplýsingar verða latnir sínámillum?

Heimildin í barnaverndarlógini kann bæði nýtast, tá málið verður kannað av fyrstan tíð, og seinni í málsgongdini.

Tá eitt mál verður tikið upp, kann tað vera trupult hjá barnaverndartænastuni at meta um, hvørt talan er um revsiverd viðurskifti, sum tað er umráðandi at boða løgregluni frá.

Tað kann eisini koma fyri, at barnaverndartænastan er stúrin um, at eitt barn hevur verið fyri kynsligum ágangi og hevur tørv á eini nærri meting, áðrenn ein møgulig fráboðan verður send løgregluni. Tá tosað verður um stúran av hesum slagi, kunnu barnaverndartænasta og løgregla lata upplýsingar sínámillum - eisini um heilt privat viðurskifti. Støðan er hin sama, tá løgreglan fær upplýsingar frá barnaverndartænastuni um børn ella ung, ið møguliga fara at føra til eina fráboðan, men har løgreglan eisini hevur tørv á upplýsingum um støðuna heima við hús, so metast kann um upplýsingarnar í mun til eitt møguligt kanningararbeiði.

***Dømi 2:***

***Barnaverndartænastan fær fráboðan frá einum skúla um eina tíggju ára gamla gentu, ið hevur sagt seg óttast mammuna, sum bæði slær og klípur hana. Gentan endurtekur hetta, tá hon tosar við málsviðgeran í barnaverndartænastuni, og undir samrøðuni tykist hon vera ávirkað av støðuni.***

***Barnaverndartænastan hevur nakrar mánaðir frammanundan vitjað heima hjá gentuni í sambandi við fráboðanir um, at gentan ikki hevur tað gott. Foreldrini eru farin frá hvørjum øðrum, og tey hava í longri tíð verið ósamd um foreldramyndugleikan. Niðurstøðan aftaná heimavitjanina var, at ósemjan var ring fyri gentuna. Foreldrini samdust tá um, at tey skuldu royna at samstarva betri.***

***Tá mamman fær at vita, hvat gentan sigur, vísir hon øllum frá sær. Hon heldur, at hetta er nakað, sum pápin hevur fingið gentuna at siga, fyri at seta mammuna í ringt ljós í trætuni um foreldramyndugleikan. Mamman ásannar tó, at hon í gerandisdegnum rópar eftir gentuni. Mamman leggur afturat, at hon vil gera alt fyri at hava dóttrina hjá sær.***

***Barnaverndartænastan umrøður málið við løgregluna og møguleikan fyri eini fráboðan. Løgreglan heldur, at sambært upplýsingunum í málinum ber ikki til at skuldseta mammuna.***

***Metingin hjá barnaverndartænastuni verður eftir hetta, at tað er tørvur á eini kanning, ið kann lýsa støðuna hjá gentuni nærri. Sum er, gerst talan sostatt ikki um tvørfakligt samstarv.***

Stúran um eitt barn ella ungfólk kann byrja á ymsan hátt. Eitt nú kunnu fráboðanir koma frá fakfólki, har stúranin er grundað á fakligu sjónarmið teirra. Eisini kunnu fráboðanir koma frá børnum ella ungum, ið siga frá ágangi móti teimum sjálvum, ella frá grannum og øðrum fólki, ið kenna umstøðurnar hjá barninum ella tí unga.

Tað er onki mark ásett fyri, hvussu ofta myndugleikarnir kunnu lata upplýsingar sínámillum sambært § 10a. Sostatt ber væl til at hava samband og lata upplýsingar sínámillum fleiri ferðir í sama máli. Sum nevnt frammanfyri skal talan tó bert vera um upplýsingar, sum eru neyðugir fyri málið, og ikki meira umfatandi, enn endamálið krevur.

Um tað vísir seg, at tørvur er á eini kanning eftir § 45 í barnaverndarlógini, tí vitan ella illgruni er um kynsligan ágang ella annan harðskap, verður Barnahúsið nýtt til kanningina.

## Myndugleikar, ið kunnu lata upplýsingar sínámillum

Teir fakbólkar, ið kunnu lata upplýsingar sínámillum sambært § 10a, eru málsviðgerar innan barnaverndartænasturnar, og innan løgreglu og ákærumyndugleika. Hesi fólk hava sambært § 26 í fyrisitingarlógini tagnarskyldu, tá talan er um vitan um heilt privat viðurskifti hjá fólki, ið tey fáa í sínum starvi. Ásetingin í § 10a í barnaverndarlógini hevur tó við sær, at upplýsingar hóast hetta kunnu latast millum omanfyri nevndu myndugleikar, tá hetta kann byrgja fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi móti børnum og ungum.

## Samtykki

Til ber at lata upplýsingar sínámillum sambært § 10a, uttan at samtykki er givið til hetta.

Tað kann tó vera gagnligt fyri eitt komandi samstarv við foreldramyndugleikan, at roynt verður at fáa samtykki til at útvega sær neyðugu upplýsingarnar. Hetta er tó treytað av, at hetta ikki hevur seinkingar við sær í málsgongdini og í tiltøkum, sum mugu setast í verk. Tað er somuleiðis ein treyt,

at royndin at fáa eitt samtykki hvørki er til bága fyri kanningararbeiðið ella tey stuðulstiltøk, ið barninum tørvar. Tá roynt verður at fáa slíkt samtykki, er støðan vanliga tann, at tey illtonktu als onki hava við familjuna at gera.

Í málum, har biðið verður um samtykki, men har tað ikki er fingið, kunnu upplýsingar hóast hetta latast myndugleikanna millum sambært 10a, um treytirnar annars eru hildnar.

***Dømi 3:***

***Løgreglan fær fráboðan um, at ein námsfrøðingur, ið er mannfólk, hevur framt kynsligan ágang móti fýra ára gomlu drongi á einum dagstovni. Samstarv verður beinanvegin sett í verk við barnaverndartænastuna í málinum.***

***Fyri at kunna meta um støðuna kann tað vera neyðugt, at barnaverndartænastan og løgreglan lata upplýsingar sínámillum um, hvar maðurin hevur arbeitt fyrr, um tað eru onnur børn á dagstovninum, ið møguliga hava verið fyri ágangi, ella um illgruni áður hevur verið til mannin um hesi viðurskifti.***

***Sambært § 10a ber til at lata allar upplýsingar sínámillum, ið hava týdning fyri málið, uttan at samtykki er givið til hetta – her í millum upplýsingar um námsfrøðingin, drongin og møguliga onnur børn, sum kunnu hava verið fyri kynsligum ágangi. Hetta er av stórum týdningi, tá metast skal um tørvin á stuðli til viðkomandi børn og familjur teirra, men eisini tá ið løgreglan kannar mál og annars í fyribyrgjandi arbeiðinum frameftir.***

## Niðurskriving av upplýsingum hjá løgregluni

Løgreglan hevur møguleika at skriva sínámillum upplýsingarnar niður til sína telduskipan, soleiðis at tað undir ávísum umstøðum ber til at finna skjótt fram til, hvussu støðan broytist hjá húskjum, ið stúrt verður um, og sum eitt nú skifta bústað ofta. Hesir upplýsingar kunnu forða ágangi frameftir, og annars byrgja fyri við at leggja uppí so tíðliga, sum til ber.

Løgreglan kann skriva upplýsingar niður, sum koma frá eitt nú kommunulæknum, skúlum, barnaverndartænastum, grannum ella øðrum. Um løgreglan sjálv fær kunnleika um viðurskifti, ið elva til stúran um ávís børn ella ung, kann hetta eisini skrivast niður til telduskipanina. Hetta kann til dømis koma fyri, tá løgreglan ger eina húsarannsókn ella annars kemur millum fólk, og sær nakað, ið ger tey stúrin um støðuna hjá einum barni ella ungfólki. Í hesum sambandi eigur løgreglan at boða barnaverndartænastuni frá sambært § 14 í barnaverndarlógini.

Hendingar, sum í einstaka førinum ikki føra til eina fráboðan, kunnu tó so hvørt vísa seg at vera partar av einum mynstri, ið løgreglan ynskir at gera nakað við – men eisini, at barnaverndartænastan gerst virkin í málinum.

***Dømi 4:***

***Eitt starvsfólk í eini barnaverndartænastu vendir sær til løgregluna, aftaná at tey hava fingið fráboðan frá einum fimleikavenjara. Venjarin greiddi frá, at ein sjey ára gamal drongur fleiri ferðir er komin til venjing við sjónskum bláum merkjum.***

***Hóast løgreglan í hesi føri møguliga kemur til ta niðurstøðu, at grundarlag ikki er fyri eini fráboðan, ber til at skriva samrøðuna niður til telduskipan teirra.***

***Kemur ein fráboðan aftur seinni um sama drong, ella frá sama venjara, kemur samrøðan við barnaverndartænastuna fram aftur, tá leitað verður í skipanini, og tískil fæst ein betri mynd av støðuni.***

## Tøk fakfólk við neyðugum førleikum, tá avgerðir skulu takast

Mál, sum snúgva seg um kynsligan ágang ella annan harðskap, eru ofta bráðfeingis, og krevja tí skjóta viðgerð. Fyritreytin fyri hesum er, at fakfólk skjótt kunnu meta um upplýsingarnar, og at tey kunnu tilrættisleggja málsgongdina uttan drál.

Til tess at røkka einum góðum og vælvirkandi samstarvi er tað av stórum týdningi, at bæði løgreglan og barnaverndartænastur hava mannagongdir fyri samstarvinum og ávís fólk, ið mynda samstarvið.

Kommununrnar eiga at hava eina *tilbúgving*, sum fyribyrgir og annars so tíðliga sum møguligt finnur fram á mál, ið snúgva seg um kynsligan ágang ella annan harðskap móti børnum og ungum.

Harafturat er ynskiligt, at umboðini fyri løgreglu og barnaverndartænastur altíð eru tøk, tá fundir skulu haldast og kanningar gerast við stuttari freist.

# Samstarvið millum barnaverndartænastur og løgreglu

## Uppgávan hjá barnaverndartænastuni

Í málum, har illgruni er um ágang móti børnum ella ungum, er tað vanliga barnaverndartænastan, ið er myndugleikin, og sum fyribyrgir og verjir móti ágangi. Harafturat skal barnaverndartænastan seta viðgerð og onnur stuðlandi tiltøk í verk, har ágangur er staðfestur.

Barnaverndartænastan skal eisini frameftir verja hesi børn og ungfólk móti ágangi og tryggja teimum neyðugan stuðul. Her er líkamikið, hvørt ákæra verður reist í einum revsimáli, og um dómur verður feldur ella ei. Barnaverndartænastan skal eisini gera sær sínar metingar av, um orsøk er at stúra um trivnaðin og menningina hjá barninum. Tað er sum so ikki Barnaverndartænastan, ið skal lyfta próvbyrðuna, tá ein ávísur illgruni er.

## Uppgávan hjá løgregluni

Í málum um ágang móti børnum ella ungum er uppgávan hjá løgregluni at meta um, hvørt grundarlag er fyri at fara í holt við kanningar, her í millum avhoyringar og læknakanning. Endamálið við løgreglukanningunum er vanliga at tryggja, at møgulig lógarbrot verða greidd. Úrslitið av kanningunum verður lagt til grund fyri, um viðkomandi verður skuldsettur. Ákærumyndugleikin reisir ikki skuldsetingar í einum revsimáli, um tað ikki verður mett, at dómur verður feldur.

## Avbjóðingar og loysnir

Tað hevur víst seg, at ymsu uppgávurnar hjá barnaverndartænastu og løgreglu hvør sær kunnu skapa fløkjur í málum, sum snúgva seg um ágang móti børnum ella ungum. Eitt gott samstarv millum partarnar, har teirra arbeiði eisini verður samskipað, kann forða fyri slíkum fløkjum í málsgongdini.

Tað er tískil av avgerandi týdningi, at barnaverndartænasturnar og løgreglan vita um hvønn annan og lata upplýsingar sínámillum frá byrjan av í einum máli. Hóast full greiða ikki er á, hvussu málið er háttað, eigur samband at vera millum partarnar, tá tað verður mett neyðugt fyri at verja børn og ung móti ágangi. Hetta ger seg eitt nú galdandi í málum, har løgreglan er farin undir at greiða møguligt lógarbrot. Tá er umráðandi, at barnaverndartænastan fær upplýsingar frá løgregluni, fyri at kunna meta um tørvin á stuðlandi fyriskipanum. Harafturat kemur løgreglan undir herdu fráboðanskylduna sambært galdandi lóggávu.

***Dømi 5:***

***Løgreglan fær fráboðan frá eini mammu, ið greiðir frá, at 16 ára gamla dóttir hennara hevur havt samband við ein mann á netinum, og sum dóttirin seinni hevur verið saman við. Dóttirin hevur verið eitt sindur løgin aftaná, at hon hevur verið saman við manninum. Hon sigur nú við mammuna, at maðurin er farin kynsliga út um mark við henni.***

***Løgreglan skal í hesum sambandi boða barnaverndartænastuni frá hendingini eftir § 14 í barnaverndarlógini, umframt at partarnir kunnu at lata upplýsingar sínámillum, um teir hava kunnleika um gentuna, hennara næstringar ella mannin.***

***Harafturat kann løgreglan skriva fráboðanina frá mammuni niður til sína telduskipan og kanna, um tey áður hava verið í sambandi við mammuna ella mannin.***

Tá løgreglan kannar eitt mál um ágang er tað eisini umráðandi, at barnaverndartænastan og løgreglan gera sær greitt, hvat barnaverndin kann gera, meðan løgreglan kannar málið og møguliga fer at avhoyra barnið við videoútgerð. Avhoyringar av hesum slagi skulu fara fram í Barnahúsinum, og skulu fara fram skjótast til ber – um tað letur seg gera, innan eina viku aftaná at fráboðanin er komin. Til ber at lesa um, hvussu løgreglan í Danmark handfer mál av hesum slagi í: Meddelelse - RM 2 - 2007.

Tá tað er greitt, hvat barnaverndartænastan kann gera, slepst undan iva um, hvat kann sigast við barnið ella ikki. Málsviðgerin má eisini tryggja barninum vernd, meðan málið verður kannað. At løgreglan kannar eitt mál merkir ikki, at barnaverndartænastan skal bíða eftir úrslitinum av kanningini. Barnaverndartænastan hevur sjálv skyldu at taka neyðugu stigini, sí meira um hetta seinni.

Í málum, har løgreglan ikki hevur nóg góð prógv til eitt rættarmál, hevur barnaverndartænastan framvegis skyldu at gera sær sínar egnu fakligu metingar. Sostatt kann tað væl vera grundarlag fyri stuðlandi fyriskipanum, um stúrt verður um eitt barn ella ungfólk, hóast løgreglan ikki ger meira við málið.

***Dømi 6:***

***Løgreglan fær eina fráboðan frá pápanum hjá einum sjey ára gomlum drongi. Drongurin býr aðru hvørja viku hjá mammuni, ið hevur foreldramyndugleikan saman við pápanum. Mamman hevur eisini ein fimtan ára gamal son búgvandi hjá sær. Drongurin hevur sagt við pápan, at fimtan ára gamli stjúkbróðurin ofta kemur upp í songina til sín um náttina og gongur honum sera nær. Pápin er illa við av hesum og vil ikki, at sonurin vitjar hjá mammuni.***

***Løgreglan setir seg í samband við barnaverndartænastuna og greiðir frá tí, sum pápin hevur sagt. Málsviðgerin upplýsir, at í undanfarnu viku komu fráboðanir frá frítíðarskúlanum hjá dronginum og frá einum granna um, at drongurin ikki hevur tað gott.***

***Avgjørt verður eftir hetta, at drongurin skal avhoyrast sum vitni. Avhoyringin við videoútgerð skal fara fram í Barnahúsinum. Løgreglan leggur bæði barnaverndartænastuni og pápanum eina við, at hvørki mamman ella stjúkbróðurin mugu fáa nakað at vita, áðrenn drongurin er avhoyrdur. Skal frágreiðingin hjá dronginum ikki verða ávirkað er umráðandi, at tað ikki frammanundan verður tosað við hann um skemmandi hendingarnar.***

***Tá barnaverndartænastan hevur fingið hesar upplýsingar frá løgregluni, eigur hon at tryggja sær, at drongurin fær neyðugu verndina og skal eisini taka støðu til, um drongurin hevur tørv á stuðli. Í hesum sambandi kann tørvur verða á samrøðum við drongin og foreldrini, og tí er av stórum týdningi, at barnaverndartænasta og løgregla neyvt avtala sínámillum, hvat verður sagt og ikki – og annars samskipa víðari gongdina.***

*Dømi 7:*

*Ein skúli boðar barnaverndartænastuni frá, at ein átta ára gamal drongur hevur sagt, at pápin slær seg og fýra ára gamla lítlabeiggjan og koyrir teir svangar í song.*

*Foreldrini eru farin hvør til sítt. Dreingirnir búgva hjá mammuni, men avtalað er, at teir eru hjá pápanum annað hvørt vikuskifti. Skúlin sigur eisini frá, at mamman javnan vendir sær til flokslæraran við síni stúran um, hvussu tað man standa til hjá pápanum. Barnaverndartænastan hevur ikki verið varug við familjuna, fyrr enn skúlin kemur við síni fráboðan.*

*Tá barnaverndartænastan tosar við báðar dreingirnar játta teir, at pápin ofta slær teir. Tann átta ára gamli sigur, at hann bløddi nasablóð, seinastu ferð pápin hevði nevan á lofti.*

*Mamman sigur frá, at hon er bangin fyri fyrrverandi manninum, ið hevur sálarligar trupulleikar at dragast við. Hann sló hana fyrr, men hon hevur ikki torað at boða løgregluni frá hesum, tí hon er bangin fyri, hvat hann kann fara at gera. Hon torir heldur ikki at boða frá, at hann er harðligur við børnini.*

*Málsviðgerin í barnaverndartænastuni tosar við løgregluna um málið og gevur teimum eina fráboðan. Málsviðgerin og løgreglan samskipa síðan teirra arbeiði frameftir, og mamman fær at vita, at best er, at maðurin ikki fær nakað at vita um fráboðanina til løgregluna. Eisini fær hon boð um, at hon ikki eigur at tráspyrja børnini, men heldur skriva tað niður, sum tey sjálvi siga frá.*

*Viðvíkjandi samveruni við børnini skal Barnaverndartænastan vegleiða mammuna um, at til ber at gera broytingar. Tað er Ríkisumboðið, ið tekur avgerð í slíkum málum.*

*Dømi 8:*

*Ein fjúrtan ára gamal drongur sigur í skúlanum, at stjúkpápin bindur og slær hann og hini systkinini. Barnaverndartænastan fær beinanvegin fráboðan um hetta, eins og løgreglan. Barnaverndartænastan tosar við børnini og avger, at ein kanning skal gerast í Barnahúsinum, so greiða kann fáast á støðuni hjá húskinum. Fólk hava ikki áður verið stúrin um familjuna, og barnaverndartænastan hevur heldur ikki verið varug við hana.*

*Løgreglan avhoyrir tann fjúrtan ára gamla og yngru systir hansara, sum er níggju ár. Eisini er ein tvey ára gomul lítlasystir, ið ikki verður avhoyrd. Drongurin endurtekur tað, sum er komin fram um harðskapin. Sambært dronginum slær mamman ikki, men hon roynir heldur ikki at forða pápanum.*

*Tá níggju ára gamla systirin, mamman og stjúkpápin verða avhoyrd, vísa tey skuldsetingum hjá dronginum aftur. Upplýsingar eru ikki frá øðrum, eitt nú lækna, skaðastovu ella skúla, ið stuðla upp undir tað, sum drongurin hevur greitt frá. Á hesum grundarlagi heldur ákærumyndugleikin ikki, at ákæra eigur at verða reist. Tað er ikki sannlíkindi fyri, at dómur verður feldur.*

***Tað er tó av stórum týdningi, at málsviðgerin hjá barnaverndartænastuni heldur fram við síni málsviðgerð og ger kanningina lidna. Sama hvat løgfrøðiliga metingin er, eru sosialfakligar orsøkir at stúra um støðuna hjá dronginum og familju hansara, tá so álvarsligar skuldsetingar um harðskap koma fram.***

# Barnahúsið

## Heildarlýsing

1. januar 2014 varð barnahús sett á stovn, sum barnaverndartænasturnar kring landið skulu nýta, tá kanningar verða gjørdar í málum um kynsligan ágang ella annan harðskap móti børnum og ungum, ella tá illgruni er um hetta.

Við at nýta Barnahúsið verður tryggjað, at hvør einstakur fær eina samskipaða og varliga viðgerð á høgum fakligum støði. Við at savna øll fakfólk saman, ið hava við málið at gera, ber betri til at kanna barnið varliga, og at veita kreppuhjálp og samrøður við sálarfrøðing.

Endamálið er eisini at gera sítt til, at barnaverndartænasturnar gera eitt munadygt arbeiði í málum um ágang, við tað at Barnahúsið veitir teimum holla ráðgeving í samskipan, útgreining og handfaring av ítøkiligu málunum.

Í málum, har ágangurin – ella illgruni um ágang – er av einum slíkum slagi, at tørvur er á samstarvi millum barnaverndartænastu, løgreglu og heilsuverk, skal Barnahúsið nýtast. Í minsta lagi tveir av hesum pørtum skulu vera uppií, um eitt mál skal viðgerast í Barnahúsinum.

Tað er alla tíðina barnaverndartænastan, sum hevur myndugleikaábyrgdina, meðan arbeitt verður við málinum í Barnahúsinum.

Starvsfólk eru knýtt at Barnahúsinum, sum bæði hava sosialfakligar og sálarfrøðiligar førleikar til at viðgera mál um ágang móti børnum og ungum. Eftir tørvi kunnu eisini onnur fakfólk verða tikin við í mál í Barnahúsinum.

Barnahúsið skal hjálpa barnaverndartænastunum at meta um, kanna og útgreina tørvin á stuðli hjá einstaka barninum ella ungfólkinum í kjalarvørrinum á tí ágangi, sum vitan ella illgruni er um.

Barnahúsið kann útvega børnum og ungum kreppuhjálp og samrøður við sálarfrøðing, um hetta verður mett sum umráðandi. Eisini kunnu tey avvarðandi fáa kreppuhjálp, um hetta hjálpir teimum at vera um barnið ella ungfólkið. Við støði í einstaka málinum veita starvsfólkini barnaverndar-tænastunum ráð um, hvussu farast skal fram við einstøku familjunum, og í hvønn mun barnið ella ungfólkið hevur tørv á stuðlandi fyriskipanum frameftir.

Løgreglan kann í sínum kanningum av málum um ágang avhoyra við videoútgerð í Barnahúsinum, og skal harafturat meta um tørvin á rættalæknafrøðiligari kanning.

Harumframt verður Barnahúsið nýtt, tá serkøn fólk meta um heilsustøðuna hjá barninum, og um nakað skal gerast í hesum sambandi.

## Tá Barnahúsið verður nýtt

Tá barnaverndartænastur gerast varugar við, at børn ella ung hava verið kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi – ella har illgruni er um hetta – kann tørvur vera á serligum stuðli. Tær skulu tá beinanvegin seta seg í samband við Barnahúsið, so kanningarnar kunnu fara í gongd. Tað er ikki av

avgerandi týdningi, hvussu barnaverndartænastan er vorðin varug við málið. Til dømis kann ein áheitan ella fráboðan vera komin frá løgregluni, lækna, heilsufrøðingi, skúla ella øðrum.

Tað er ein fortreyt fyri, at eitt mál verður kannað í Barnahúsinum, at einstaka barnaverndartænastan hevur gjørt av, at ein kanning skal gerast eftir § 45 í barnaverndarlógini, ella at ein ískoytiskanning verður gjørd afturat kanning, sum er gjørd fyrr.

Tað er somuleiðis ein fortreyt fyri, at eitt mál verður kannað í Barnahúsinum, at fakfólk frá løgreglu ella heilsuverki eisini eru partar av málinum.

Meðan málið verður kannað í Barnahúsinum, er tað framvegis avvarðandi barnaverndartænasta, ið hevur myndugleikaábyrgdina av kanningini og av møguligum avgerðum um, at seta stuðlandi fyriskipanir í verk. Avgerðir um stuðul kunnu takast eftir ráðum frá starvsfólki hjá Barnahúsinum, men tað er barnaverndartænastan, ið hevur avgerðarrættin.

# Sínámillum upplýsingar í Barnahúsinum

## Heildarlýsing

Stk. 2 í § 10a í Løgtingslóg um barnavernd er neyðuga heimildin fyri, at teir myndugleikar, ið samstarva um eitt mál í Barnahúsinum, kunnu lata sínámillum upplýsingar.

## Endamálið við § 10a

Endamálið við stk. 2 í § 10a um sínámillum upplýsingar í málum, har Barnahúsið verður nýtt, er at vísa fyrilit fyri teimum børnum og ungu, ið koma hagar, og samstundis tryggja, at sum mest kemur burtur úr tvørfakliga samstarvinum.

Børnini ella ungfólkini sleppa undan at greiða frá áganginum og øðrum persónligum viðurskiftum umaftur fleiri ferðir. Harafturat verður tryggjað, at fakfólkini arbeiða eftir eini heildarfatan og byggja upp ein felags vitanargrunn.

## Treytir

### Fakfólk, ið kunnu lata upplýsingar sínámillum

Tá eitt mál verður kannað og útgreinað í Barnahúsinum, eru fakfólk frá fleiri ymsum myndugleikum uppií.

Tey fakfólk, ið kunnu lata upplýsingar sínámillum um heilt privat viðurskifti hjá teimum, sum málið snýr seg um, eru starvsfólkini, sum eru knýtt at Barnahúsinum, løgreglan og ákærumyndugleikin, eins og heilsuverk og starvsfólk innan barnaverndartænasturnar. Tað er umráðandi, at øll tey, ið hava týdning fyri málið, verða tikin við, so tað verður lýst til fulnar og samskipað.

Tað, at løgreglufólk eru partar av einum máli í Barnahúsinum, gevur teimum ikki loyvi at lata upplýsingar víðari til onnur fólk hjá løgregluni, men bert teimum, sum eru knýtt at málinum og málsviðgerðini.

Í nøkrum málum í Barnahúsinum kann tað hava týdning, at starvsfólk úr heilsuverkinum taka lut. Talan kann til dømis vera um ein barnalækna ella annan lækna við servitan um kynsligan ágang móti børnum. Onnur góðkend heilsustarvsfólk kunnu vera kommunulæknin, sum kemur uppí málið, til dømis í sambandi við, at løstirnir hjá barninum verður kannaðir og viðgjørdir. Eisini tey kunnu lata sínámillum upplýsingar.

Tað kann eisini hava týdning fyri viðgerðina av málinum, at onnur fakfólk taka lut fyri at fáa fulla greiðu á tørvinum hjá barninum ella ungfólkinum. Talan kann til dømis vera um starvsfólk hjá Ríkisumboðnum, ið hava samveru- og foreldramyndugleikamál sum málsøki. Hesi starvsfólk eru eisini fevnd av § 10a í barnaverndarlógini.

***Dømi 9:***

***Ein sjey ára gomul genta við menningartarni genta er til útgreiningar í Barnahúsinum, tí barnaverndartænastan hevur fingið fráboðanir, har fólk eru stúrin um, hvat henni man vera fyri heima við hús. Hon ber ofta merki eftir, at hildið er fast í henni, ella at hon er sligin. Tað, sum hon sigur um hetta, er eitt sindur skiftandi. Løgreglan er eisini uppií málinum.***

***Fyri at fáa fulla vissu um støðuna hjá gentuni og tørv hennara, kann tað vera av týdningi, at fólk við serligari vitan um børn við menningartarni tekur lut í kanningini.***

## Upplýsingar, ið kunnu latast sínámillum

Allir týðandi upplýsingar um heilt privat viðurskifti, sum hava við umstøðurnar hjá einum barni heima við hús at gera, kunnu latast sínámillum.

Heilt privat viðurskifti fevna eitt nú um upplýsingar um heilsustøðuna og tyngjandi sosialar trupulleikar, eins og upplýsingar um menningarstøðuna hjá barninum ella tí unga, ella viðurskifti viðvíkjandi atburði, familju, heilsu, skúla, frítíð og vinum.

Málsviðgerin hjá barnaverndartænastuni og tey fakfólk, sum arbeiða við einum máli í Barnahúsinum, kunnu eitt nú lata upplýsingar sínámillum um likamligu ella sálarligu støðuni hjá einum persóni fyrr, nú ella frameftir, eins og nýtslu av heilivági ella misnýtslu av rúsandi evnum, eins og lata upplýsingar um teirra kynslív og um møgulig revsiverd viðurskifti.

Eisini kunnu upplýsingar verða latnir sínámillum um børn og ung, ið vantrívast og til dømis hava ein avbjóðandi kynsligan atburð, hava ilt við at hugsavna seg, hava ilt í búkinum, halda seg fyri seg sjálvi, og tá ótti er fyri, at orsøkin til vantrivnaðin er at finna í kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi.

Tað kann eisini vera týðandi at lata upplýsingar sínámillum um arbeiðsviðurskifti og arbeiðspláss hjá einum fólki, sum er undir grundaðum illgruna um kynsligan ágang ella annan harðskap.

Hvørjar kanningar, ið skulu gerast, og hvørji stig, sum eiga at verða tikin í einum máli, kunnu eisini verða umrødd millum partarnar. Her er umráðandi, at málsgongdin er samskipað soleiðis, at partarnir kunna hvønn annan um, hvat hevur týdning fyri málsviðgerðina. Eitt nú, at teir í sambandi við avhoyringina gera sær greitt, hvat tosast kann um, og hvat man vera best, ikki at koma inn á.

Tað er av stórum týdningi, at fakfólkini tosa við barnið ella ungfólkið og familjuna og møguliga seta fyriskipanir, uttan at bíða eftir avhoyringini við videoútgerð. Tað er tó samstundis umráðandi, at barnið ikki verður ávirkað soleiðis, at útsøgnirnar hjá barninum kunnu broytast, áðrenn avhoyringin er farin fram. Tá løgreglan og málsviðgerin í barnaverndartænastuni tosa saman, eiga tey at finna fram til, hvussu tey hvør í sínum lagi tosa við barnið, men annars kunnu samrøður annars við barnið og fyriskipanir setast í verk í mun til onnur viðurskifti hjá barninum.

Um løgreglan metir, at ein avhoyring skal gerast við videoútgerð, skal hetta fara fram í Barnahúsinum skjótast til ber – um tað letur seg gera, innan eina viku aftaná at fráboðanin er komin.

Í málum, har Barnahúsið verður nýtt, kann tað hava týdning at lata upplýsingar sínámillum um eitt nú atburðin hjá barninum ella ungfólkinum, upplýsingar um, hvat er hent við barninum ella

ungfólkinum áðrenn málið byrjaði, ella upplýsingar sum eru komnir frá viðkomandi sjálvum. Førleikar og arbeiðsuppgávur kunnu á henda hátt býtast skilagott millum partarnar við atliti at barninum ella tí unga.

Avmarkanin av, hvørjir upplýsingar hoyra til heilt privat viðurskifti, samsvarar við tær í fyrisitingarlógini og í persónsupplýsingarlógini.

Tá mett verður um, hvørt upplýsingar hoyra til heilt privat viðurskifti, eigur dentur at verða lagdur á, um upplýsingarnir í sjálvum sær avdúka serliga viðkvæmar síður av heimalívinum hjá tí einstaka.

Um upplýsingar ikki kunnu latast sínámillum eftir § 10a, er framvegis møguleiki fyri hesum í samsvari við heimildirnar í fyrisitingarlógini og persónsupplýsingarlógini. Sí nærri um hetta seinni.

## Tað skal vera neyðugt við sínámillum upplýsingum

Tað skal vera neyðugt at lata upplýsingar sínámillum fyri at hjálpa einum barni ella ungum, har heilsa og menning kann vera hótt, og sum hevur tørv á stuðlandi tiltøkum eftir barnaverndarlógini.

Sostatt skal í hvørjum einstøkum føri verða mett um, hvørjir upplýsingar, sum tørvur er á at lata sínámillum.

Tað er tó umráðandi, at myndugleikarnir ikki halda ov nógvum aftur, ella eru ov varnir við at lata upplýsingar sínámillum, tá eitt mál verður viðgjørt í Barnahúsinum.

## Nær ber til at lata upplýsingar sínámillum?

Upplýsingarnir í einum ítøkiligum máli, sum skal viðgerast í Barnahúsinum, kunnu latast sínámillum áðrenn kanningarnar í Barnahúsinum, meðan kanningarnar fara fram og aftaná tilgongdina í Barnahúsinum.

Áðrenn kanningin verður gjørd, kann málsviðgerin í barnaverndartænastuni lata upplýsingar sínámillum við hinar myndugleikarnar í málinum, sum hava týdning fyri fyrstu handfaringina av málinum. Tað kann eitt nú snúgva seg um vegleiðing í, um tørvur er á bráðfeingis tiltøkum sambært § 17 í barnaverndarlógini – eitt nú, at viðkomandi barn ella unglingi verður tikin úr heiminum.

Áðrenn kanningina kann eisini vera tørvur á sínámillum upplýsingum, so málið kann samskipast millum barnaverndartænastu, løgreglu, heilsumyndugleikar og onnur.

| |
|---|
| ***Dømi 10:*** <br><br> ***Løgreglan boðar barnaverndartænastuni frá, at løgreglan fer eftir einum manni, sum er illtonktur fyri at skemma níggju ára gamla sonin hjá grannanum. Avtalað verður, at málsviðgerin hjá barnaverndartænastuni beinanvegin, tá løgreglan hevur verið á staðnum, fer at vitja heima hjá dronginum og foreldrum hansara. Ætlanin er at tosa við drongin, og at tosa við hini í húsinum um, at barnaverndartænastan er stúrin um hann, og at ein kanning fer at verða gjørd í Barnahúsinum í hesum sambandi.*** |

Í málsgongdini í Barnahúsinum kann tað hava sín týdning, at teir upplýsingar, sum barnið kemur við, tá avhoyrt verður við videoútgerð, fara víðari til starvsfólkini í Barnahúsinum ella onnur, sum eru uppií málinum, fyri at sleppa barninum undan at siga frá áganginum fleiri ferðir. Harafturat kunnu upplýsingar, sum koma frá barninum, hava týdning fyri bæði barnaverndartænastuna og fyri løgregluna, tá málið verður kannað.

***Dømi 11:***

***Ein átta ára gomul genta greiðir barnaverndartænastuni frá, at maðurin, sum hevur skemmað hana, eisini hevur havt samband við tvær aðrar gentur har umleið.***

***Tað hevur týdning fyri løgregluna at fáa neyvar upplýsingar (nøvn, bústað o.a.), so tey kunnu víðka kanningina. Málsviðgerin í barnaverndartænastuni skal harafturat meta um, hvørt tiltøk skulu setast í verk í mun til hinar báðar genturnar og familjur teirra.***

***Dømi 12:***

***Ein seks ára gomul genta sigur í eini samrøðu við sálarfrøðing í Barnahúsinum, at tað ikki bara er pápabeiggi hennara, sum hevur skemmað hana – sum hon annars hevur sagt við løgregluna – men eisini pápi hennara.***

***Upplýsingar av hesum slagi eru týðandi at lata sínámillum, bæði við løgregluna og við barnaverndartænastuna. Fyri løgregluna merkir hetta, at kanningin verður víðkað, og barnaverndartænastan eigur at gera sær eina meting av, um gentan er nóg væl vard við teimum fyriskipanum, sum longu eru settar í verk.***

Aftaná kanningina í Barnahúsinum kann tað hava týdning fyri barnaverndartænastuna og fyri tey fakfólk, ið hava tikið lut í kanningini, at tosa um málið. Tey kunnu eitt nú, í sambandi við ætlanirnar hjá barnaverndartænastuni, tosa um innihaldið í skrivligu frágreiðingini hjá Barnahúsinum. Tað er ongin tíðaráseting sett fyri, nær fakfólkini, sum hava verið knýtt at málinum, ikki longur kunnu lata upplýsingar sínámillum. Tað skal tó altíð ein ítøkilig meting gerast av, um tað verður mett neyðugt at lata upplýsingar sínámillum, fyri at hjálpa einum barni ella ungum við atliti at heilsu og menning.

Harafturat kunnu upplýsingar latast sínámillum í einum máli, tá partarnir tosa um sínar fakligu royndir, og fyri at byggja upp eitt felags vitanargrundarlag. Hetta fyri at gera framtíðar samstarvið so gott og munadygt sum møguligt, og at tryggja eina góða viðgerð í málum um kynsligan ágang ella annan harðskap.

***Dømi 13:***

***Tað hevur í fleiri ár verið ein ávís stúran um viðurskiftini heima hjá eini trý ára gamlari gentu og fýra og eitt hálvt ára gamla beiggja hennara. Barnaverndartænastan hevur javnan fingið fráboðanir, m.a. frá dagstovninum, sum børnini eru á, og frá fólki í bygdini. Tað hevur verið nógv klandur millum foreldrini. Tey eru flutt frá hvørjum øðrum og flutt saman aftur, og løgreglan hevur verið á gátt, tá fráboðanir eru komnar um harðskap og bardaga. Afturat hesum koma børnini ikki regluliga á dagstovnin, og reinførið er vánaligt. Fleiri hava eisini greitt frá, at mamman drekkur.***

***Eitt ávíst samstarv hevur verið millum foreldrini og barnaverndartænastuna, men higartil hava foreldrini víst allan stuðul frá sær og hava ikki ynskt, at barnaverndartænastan kemur uppí. Málsviðgerin er frammanundan farin undir eina kanning, men hon er ikki liðug enn.***

***Málsviðgerin fær upplýsingar um, at pápin hevur bart drongin av. Løgreglan fær beinanvegin fráboðan um hetta, og bæði børnini verða bráðfeingis tikin úr heiminum. Avgjørt verður, at ein kanning av harðskapinum móti dronginum skal gerast í Barnahúsinum.***

***Í samstarvi við Barnahúsið verður støðan hjá familjuni kannað, eins og tørvurin hjá dronginum á stuðlandi fyriskipanum. Sambært hesum avger barnaverndartænastan eisini, at ein foreldraførleikakanning verður gjørd. Úrslitið av hesi kanning er, at hvørki mamman ella pápin kunnu geva børnunum neyðugu umsorganina. Málsviðgerin metir, at bæði børnini eiga at vera eina tíð hjá kønum vaksnum fólki, tá hugsað verður um gerandisdagin hjá teimum higartil.***

***Barnaverndarnevndin tekur avgerð um, at børnini skulu flytast til fosturforeldur. Tá tríggir mánaðir eru gingnir, fer drongurin at siga frá ymiskum, sum er hent heima hjá teimum, eitt nú, at systurin hevur verið fyri kynsligum ágangi.***

***Málsviðgerin setir seg tí í samband við Barnahúsið, so nærri kann verða komið inn á støðuna hjá dronginum, nú nýggju upplýsingarnir liggja á borðinum. Eisini tosar málsviðgerin um møguleikan fyri, at eitt ískoyti viðvíkjandi systrini verður gjørt til kanningina eftir § 45, og at brúka Barnahúsið til hetta.***

### Samtykki

Til ber at lata upplýsingar sínámillum eftir § 10a, uttan at samtykki er givið til hetta.

Undir ávísum umstøðum, við atliti at einum komandi samstarvi við foreldramyndugleikan, kann tó vera gagnligt, at roynt verður at fáa  samtykki til at fáa neyðugu upplýsingarnar. Hetta er tó treytað av, at hetta ikki hevur seinkingar við sær í málsgongdini og tiltøkum, sum mugu skulu setast í verk. Tað er somuleiðis ein treyt, at royndin at fáa eitt samtykki hvørki er til bága fyri kanningararbeiðið ella tey stuðulstiltøk, ið barninum tørvar. Tá roynt verður at fáa samtykki, er støðan vanliga tann, at tey illtonktu als onki hava við familjuna at gera.

Í málum, har biðið verður um samtykki, men har tað ikki er fingið, kunnu upplýsingarnar hóast hetta latast millum myndugleikarnar eftir  10a, um treytirnar annars eru hildnar.

## Virkis- og avgerðarmyndugleiki

Tað er framvegis barnaverndartænastan í avvarðandi kommunu, ið hevur myndugleikaábyrgd fyri kanningini í Barnahúsinum, eins og ábyrgd av, at avgerðir verða tiknar um møguligar stuðlandi fyriskipanir. Avgerðir um slíkar fyriskipanir kunnu takast eftir ráðum frá starvsfólki í Barnahúsinum, men tað eru barnaverndartænasturnar, ið sjálvar hava fullan avgerðarmyndugleika.

Tann parturin av kanningini, sum fer fram í Barnahúsinum, hyggur serliga at teimum viðurskiftum, ið knýta seg áganginum, ella illgrunanum um ágang. Málsviðgerin hjá barnaverndartænastuni skal tí –

samtíðis sum kanningin í Barnahúsinum fer fram – gera eina heildarkanning av støðini hjá barninum, sum tekur úrslitini í Barnahúsinum við.

Tá eitt barn er útgreinað í Barnahúsinum, heldur málið fram hjá barnaverndartænastuni sambært galdandi ásetingum í Barnaverndarlógini.

***Dømi 14:***

***Ein ellivu ára gamal drongur og systir hansara hava í nøkur ár verið til umlættingar eitt vikuskifti hvønn mánað hjá fosturforeldrum. Mamman er sálarsjúk og hevur verið innløgd fleiri ferðir.***

***Brádliga eitt vikuskifti smokkar drongurin saman og greiður fosturforeldrunum frá, at tað í eina tíð hevur staðið illa til við mammuni. Hon slær tey, og hevur eisini hótt við knívi. Hann torir ikki at fara heim aftur til hana.***

***Í hesi støðu er tørvur á einum ískoyti til kanningina, sum áður er gjørd eftir § 45. Ískoytið skal gerast við at nýta Barnahúsið, tí upplýsingarnir um ágang móti børnum eiga at hava við sær, at løgreglan kemur uppí. Barnaverndartænastan kann tó ikki bíða eftir úrslitinum av kanningini, áðrenn støða verður tikin til, hvussu gerandisdagurin hjá børnunum verður tryggjaður. Barnaverndartænastan má beinanvegin gera sær greitt, hvussu børnini verða tryggjaði, til kanningin er liðug.***

# Aðrar viðkomandi reglur um at lata upplýsingar sínámillum og samstarva

## Sum heild

Heimildin at lata upplýsingar sínámillum sambært § 10a í barnaverndarlógini skal síggjast í mun til aðrar galdandi ásetingar um tagnarskyldu í barnaverndarlógini, fyrisitingarlógini, persóns-upplýsingarlógini og í rættargangslógini.

Tað eru hesar ásetingar, ið verða umrøddir í stuttum í hesum parti. Endamálið er at geva eitt yvirlit yvir reglurnar annars, tá talan er um at lata sínámillum upplýsingar, og sum skulu síggjast í mun til § 10a í barnaverndarlógini og tað høpið, sum henda heimild er ein partur av.

## Barnaverndarlógin

### Herd fráboðanarskylda

Í § 14 í barnaverndarlógini verður ásett, at øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.

## Fyrisitingarlógin

### Tagnarskylda

Tey sum starvast innan almennu fyrisitingina hava sambært § 26 í fyrisitingarlógini tagnarskyldu, jbr. borgarligu revsilógina § 152 og §§ 152c-l52f, tá ein upplýsing við lóg ella aðrari gildari áseting hevur trúnaðarfrámerki, ella tá tað annars er neyðugt at halda hana loyniliga fyri at verja serstøk fyrilit viðvíkjandi almennum ella privatum áhugamálum.

Ásetingarnar um tagnarskyldu skulu millum annað tryggja, at sínámillum upplýsingar um børn og ung og viðurskifti teirra heima við hús bert verða latnir millum fakfólk, tá hetta er neyðugt, og tá tað hevur eitt sakligt endamál.

Í § 26 í fyrisitingarlógini verður nevnt, hvørji fyrilit kunnu gera seg galdandi, at upplýsingar eru í trúnaði og sostatt eru fevndir av tagnarskyldu.

Av serligum týdningi í sambandi mál um ágang eru fyrilitini fyri fyribyrging, kanningararbeiði og at greiða lógarbrot, vernd av tí ákærda eins og upplýsingar um persónlig viðurskifti hjá einstøkum persónum.

Ásetingin í § 10, stk. 2 í barnaverndarlógini ber tó, hóast tagnarskylda er áløgd sambært fyrisitingarlógini, í sær, at upplýsingar kunnu latast sínámillum, *tá umhugsni fyri viðurskiftum barnsins fer fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva grund fyri dyljan*. (sí frammanfyri).

## Persónsupplýsingarlógin

### Sum heild

Persónsupplýsingarlógin snýr seg um handfaring av persónsupplýsingum. Skilt verður millum, um upplýsingarnar eru viðkvæmar ella ikki, sbr. § 10 í lógini.

### Forrættindi

Um ásetingar í øðrum lógum enn í persónsupplýsingarlógini hava frægari rættarstøðu við sær fyri persón, ið sínámillum upplýsingar verða latnir um, skulu hesar ásetingar nýtast, soleiðis sum § 4 í persónsupplýsingarlógini fyriskrivar.

Tað er ætlanin við heimildini í § 10a í barnaverndarlógini um at lata sínámillum upplýsingar uttan samtykki, at henda áseting kemur fram um ásetingarnar í persónsupplýsingarlógini.

Í tann mun, at § 10a í barnaverndarlógini ikki kann nýtast, má verða mett um, hvørt sínámillum upplýsingarnir kunnu latast eftir persónsupplýsingarlógini.

### Viðkvæmir upplýsingar

Í § 2, pkt. 9 í lógini verður nevnt, hvat skilst við viðkvæmar upplýsingar, og í § 10 verður ásett, hvussu hesar skulu handfarast.

§ 9, pkt. 5 í persónsupplýsingarlógini snýr seg millum annað um viðgerðina hjá almennu umsitingini – her í millum at lata upplýsingar víðari um revsiverd viðurskifti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti.

## Rættargangslógin

### SSP-samstarvið

Ein onnur heimild til at lata upplýsingar sínámillum um heilt privat viðurskifti hjá børnum og ungum er at finna í § 115b rættargangslógini, ið millum annað gevur heimild til at lata upplýsingar sínámillum innan SSP-samstarvið. Henda áseting gevur skúlum, sosialum myndugleikum og løgreglu møguleika at lata upplýsingar sínámillum, um hetta er neyðugt fyri samstarvið, ið skal fyribyrgja brotsverkum. Upplýsingar kunnu sambært hesi áseting latast millum samstarvspartarnar, uttan at samtykki er givið frammanundan.